# Opel í kreppu

Tað er ikki óhugsandi, at tann kenda bilverksmiðjan Opel verður noydd at lata sínar deildir í Týsklandi aftur fyri at sleppa livandi ígjøgnum fíggjarkreppuna, men leiðslan fer at gera slt fyri at sleppa undan tí, sigur aðalstjórin, Hans Demant. Í samrøðu við vinnublaðið Wirtschaftswoche sigur Demant, at út frá einum fíggjarligum sjónarhorni tykist tað skilagott at lata verksmiðjudeildir aftur , men at leiðslan eisini má hugsa um síni starvsfólk og teirra lív. Týsk bløð hava annars skrivað, at General Motors, sum eigur Opel, hevur havt ætlanir um at lata aftur tríggjar verksmiðjur í Týsklandi og Belgia við 11.000 starvsfólkum aftur.



# Vindmyllur almennan stuðul

Bretsk orkufeløg, sum hava gjørt ovurstórar íløgur í havvindmyllulundir, siga seg hava tørv á tveimum milliardum pundum í almennum stuðuli fyri at fullføra verkætlaninar. Tað skrivar blaðið Times. Sambært blaðnum eru onkrar verkætlanir steðgaðar fyribils, tí feløgini vilja hava at vita, um tey fáa almennan stuðul. Bretska vindmyllufelagið BWEA sigur, at ídnaðurin ríður á einari knívsegg, eftir at fíggjarkreppan hevur gjørt fíggingina nógv dýrari enn upprunaliga mett. Úrslitið er, at tvær milliardir pund resta í til at fullføra níggju stórar vindmylluverkætlanir á sjónum, sigur felagsskapurin.

áðrenn, og teir høvdu eisini eina lutfalsliga nýggja tappimaskinu.

- Tað einasta sum manglaði, var goymsluplássið og tangar. Og tað var tað, sum vit fóru í holt við beinanvegin tá, sigur Einar Waag.

Fyrstu tíðina var tað ikki bara sum at siga tað at fáa hendur í einum kassa av sterkum øli.

- Vit høvdu framman undan goymslur kring landið, og tað blivu somu goymslurnar, sum fóru at selja sterka ølið. Men tað var ein trupul framferðarháttur hjá fólki at keypa øl. Tað var neyðugt at bíleggja dagin fyri, gulølið var rationiserað og tú skuldi hava rationeringskort, tú skuldi vísa skattakvittan á posthúsinum, tá tú rindaði fyri ølið, og tá fyrstani kundi tú fara á goymsluna eftir ølinum, sigur Einar Waag.




*Einar Waag, stjóri, við einum breiðum úrvali av teimum ølsløgum, sum Føroya Bjór bryggjar í dag*

## Fleiri sløg

Men mannagongdin var kortini ikki truplari enn so, at fólk vistu, at tá tey bíløgdu ein kassa av øli, fingu tey hann dagin eftir.

Undan tí skuldu fólk jú bíða upp í fleiri vikur viðhvørt eftir, at kassarnir skuldu koma við skipi úr Danmark, so tað var eitt framstig við lítlari og ongari bíðtíð, eins og tær ikki nýttist at keypa meiri enn ein kassa á gangin, sigur Einar Waag.

Hartil kom so eisini, at føroyska ølið var munandi bíligari.

Men størsta broytingin kom kortini í 1992, tá loyvt varð at skeinkja sterkt á skeinkistøðum, eins og rúsdrekkasølur lótu upp kring landið.

- Ja, tað var ein rættiliga kollvelting, tí bar knappliga til hjá fólki at keypa seks øl ella eina einstaka fløsku, og tað var nakað heilt nýtt. Rúsdrekkasølurnar merktu eisini, at tað gjørdist líka lætt at fáa fatur á útlendskum øli, so tann sølan vaks aftur upp til áleið 15% til 20%, og har hevur hon so ligið síðani, sigur stjórin á Føroya Bjór.

Sum tíðin leið vuksu ølsløgini, sum blivu bryggjað.

- At byrja við bryggjaðu vit bert veðr og gull. So kom Slupp-øl nakað seinni, síðani Black Sheep og Klassik. Eisini fóru vit at bryggja Portaran. Síðani hava vit bryggjað ymisk sløg fram til í fjør, tá vit fóru undir eina heila røð, sigur Einar Waag.

Hann sigur, at fólk kravdu ikki so nógv at byrja við.

- Tað var ikki fyrr enn smáu bryggjaríini í Danmark komu fram, at fólk fóru at krevja meira, og tað royndu vit so at eftirlíka. Tað ber næstan til at siga, at tað kom ein heilt nýggjur ølmentan. Fólk byrjaðu at tosa um belgiskt øl, og eingin ánaði, hvat tað var fyri nakað fyrr. Nú vilja fólk hava myrkt øl, beiskt øl og sterkt øl, sigur Einar Waag.

Men eitt er, at føroyingar flyta inn útlendskt øl, hvussu er við útflutningin hjá Føroya Bjór?

- Vit ganga út frá, at sølan í Føroyum minkar, og tí arbeiða vit meiri við sølu til útflutning, og tað verður so í fyrsta umfari Danmark. Har búgva jú 5 milliónir fólk, og vit hava verið hampiliga væl inni har, og nú royna vit at koma odriliga inn aftur har, sigur Einar Waag.

Hann sigur, at teir eisini hyggja at Íslandi alla tíðina.

- Vit hava sjálvandi trupulleikar av dósum, og eg ætli mær ikki at koma inn á Íslandssáttmálan og einaferðs pakning, tað loysir seg ikki at umtala, tí tað er eingin endi á, hvat politikarar og teirra embætisfólk kunnu finna upp á. Vit vita ongantíð, hvar vit hava teir, sigur Einar Waag.

## St. Bridget til heiðurs

Tað hevði sína søgu, at Føroya Bjór av fyrstan tíð fór undir at bryggja nýggj sløg av øli.

- Slupp ølið var hitt fyrsta, og tað var upp undir eina ólavsøku, at teir, sum riggaðu sluppina til, ynsktu eitt serlit øl, og tað endaði so við Sluppølinum. Tað gjørdist tó so væl umtókt, at vit hildu fram at bryggja tað, sigur Einar Waag.

Sluppøl er ein øl, sum er myrkari enn vanliga gulølin við meiri malti og litmalti, og tað er eisini ein øl, sum er væl dámd millum manna. Black Sheep ølin var seliga ætlað til útflutning, og hon varð eisini væl móttikin, serliga í Keypmannahavn. Og tá talan er um serligar øl, slepst ikki uttan um jóla- og páskabryggjunum.

- Páska- og jólabryggið eru fyri so vítt eitt danskt fyribrigdi, sum gongur heilt aftur í 1890-ini, og eg haldi meg minnast, at vit byrjaðu við páskabrygginum í 1982, og jólabryggið hevur helst verið um ta tíðina eisini, sigur Einar Waag.

Í fjør vór Føroya Bjór so undir eina nýggja røð av øli, sum fekk navnið St. Bridget, og sum fæst í fýra variantum.

- 17. mars var St. Patrick's Day, sum er írski tjóðardagurin. St. Patrick er størsta halgimenni í Írlandi, men har er eisini eitt kvinnuligt halgimenni, sum kallast St. Bridget. Tá á vit valdu at gera eina røð av ølum, skuldu vit finna eitt navn, og tá vit einki føroyskt funnu, valdu vit St. Bridget, sigur Einar Waag.

Søgnin sigur, at St. Bridget var ein nunna, sum gjørdi baðivatnið hjá sær um til øl til munkarnar at drekka, og tað er hon kend fyri í Írlandi. Hon verður mett sum næst mætasta halgimenni eftir St. Patrick í katólska Írlandi.

Við til søguna um mennan av føroysku ølsløgunum hoyrir eisini avbjóðingin í at kappast beinleiðis í jøvnum føti við influtta danska ølið.

- Til dømis komu donsku bryggjaríini við einari klassik, og tá vit høvdu hugt at hesari ølinum í eini tvey ár, fóru vit undir at gera okkara egnu klassik-øl. Tað vísti seg, at hin var fult so góð sum hinar, og vit hava meginpartin av tí marknaðinum av tí ølinum í dag, sigur Einar Waag.

So Føroya Bjór fylgir við allastaðni, har teir síggja ein møguleika.

## Eisini sodavatn

Tað er heldur ikki bara at siga tað, at fara undir eitt nýtt ølslag.

- Vit hava samband við ráðgevarar. Vit hyggja eftir, hvussu ein serlig øltypa skal gerast – og tað eru traditiónir fyri tí – og antin spyrja vit ráðgevan, ella royna vit sjálvi fyrst, sigur Einar Waag.

Vanliga mannagongdin er, at royndir í smáum nøgdum verða gjørdar, og mislukkast tað, verður hetta ølið bara koyrt burtur, men sum oftast lukkast tað fyrstu ferð.

- Tað ber til at variera ølið við ymiskum maltsløgum og ymiskum humlusløgum. Eisini ber til at nýta ymiska gering, bæði undirgering og yvirgering, so har eru nógvir møguleikar, sigur Einar Waag.

Men Føroya Bjór er ikki bert øl, teir bryggja eisini sodavatn norðuri í Klaksvík.

- Vit fingu nokk so tíðliga fatur í Jolly merkinum, Jolly Cola æt tað fyrr, og tað hevur verið ein týðandi táttur í okkara sodavatnsframleiðslu og er tað enn. Í